Føroyskur flogskipari í Íslandi:

# Umboðar íslendskar útróðrarbátar í Føroyum



*Føroyski umboðsmaðurin, Ellef Ellefsen, sigur, at tað, sum er kollveltandi við Seigur 1000, er, at báturin er skjóttgangandi, ógvuliga rúmligur og sera orkusparandi – sjálvt við góðari ferð*

**Ellef Ellefsen sigur, at fyritøkan, Seiglu ehf. í Reykjavík hevur higartil bygt 4 bátar. Virksemið byrjaði fyri 10 árum síðan, tá ið fyritøkan átók sær at broyta bátar fyri íslendskar útróðrarmenn. – Her fingu teir tann kunnleika og tær royndir, sum eru grundarlagið fyri bátaslagnum, teir byggja í dag, sigur føroyski umboðsmaðurin**

BÁTASØLA
*Vilmund Jacobsen*

Ellef Ellefsen, sum er føroyingur, men starvast sum stýrimaður innan íslendsku loftferðsluna, umboðar eisini íslendskar útróðrarbátar í Føroyum.

Báturin, sum hann ynskir at gera vart við í Føroyum, ber heitið, Seigur 1000. Hann er 10 metrar langur og 3 metrar breiður.

Seigur er teknaður og bygdur av fyritøkuni, Seiglu ehf. Í Reykjavík. Hetta arbeiði byrjaði fyri 10 árum síðan, tá ið Seiglu byrjaði at broyta bátar fyri íslendskar útróðrarmenn.

– Her fingu teir tann kunnleika og tær royndir, sum eru grundarlag fyri bátaslagnum, teir byggja í dag.

Ellef sigur, at fyritøkan higartil hevur bygt 4 bátar. Leveringstíðin er 3 mánaðir, eftir at sáttmáli er undirskrivaður; tá liggur báturin í Føroyum.

### Skjóttgangandi og ógvuliga rúmligur

Føroyski umboðsmaðurin sigur, at tað, sum er kollveltandi við júst hesum bátinum, er, at hann er skjóttgangandi, ógvuliga rúmligur og sera orkusparandi – sjálvt við góðari ferð.

– Báturin er soleiðis bygdur, at honum nýtist ikki nógva orku til at sigla skjótt, sigur Ellef, sum tekur eitt dømi fram:

– Tað eru bátar, sum sigla skjótt. Vit kunnu t.d. taka ein 33 fóts bát, sum siglir 22 míl tómur, men bert 10 míl við fullari last. Seigur 1000 gongur 26 míl við fullari last.

Seigur 1000 hevur 450 hk. volvo penta.

### Nógv ferð, brennur lítið

– Báturin er »testaður« við fullum tanga av olju, 1300 litrum (1050 kg.), 16 kassum í lastini (480 kg.) og 800 kg. av gørnum. Við hesi last sigldi hann 26 míl og brúkti 2, 4 litrar av olju fyri hvørja míl ella 62,4 litrar um tíman. Síðan varð hann lastaður við 2 tonsum aftrat. Við tyngri last og 26 míla ferð, var oljunýtslan 3,2 litrar fyri hvørja míl ella 83,2 litrar um tíman, sigur føroyski umboðsmaðurin.

Sum dømi um ferðina, sigur Ellef, at Seigur 1000 hevur hálvan triðja tíma út á Føroya Banka.

Spurdur, hvat báturin kostar, nevnir umboðsmaðurin ikki nakað tal, men vísir á, at eingin bátur av somu stødd, er bíligari enn Seigur 1000.

Umborð á útróðrarbátinum eru tvær koyggjur, wc, bonkur, borð og gasskomfýrur.

Íslendski útróðrarbáturin fæst eisini 11 metrar langur og 3,2 metrar breiður.



# Fiskimenn slítast upp langt fyri tíðina

**– Uppi á landi eru øll møgulig krøv um trivnað. Vit hava arbeiðseftirlit, trygdarnevndir o.a., sum skulu ansa eftir, at arbeiðsumhvørvið er í lagi. Men umborð á okkara fiskiskipum eru eingi krøv um, at fiskimenn skulu arbeiða undir góðum umstøðum, segði Rúna Sivertsen, tá ið málið um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap var til viðgerðar á tingi fríggjadagin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Løgtingskvinnan í Norðoyggjum nam við spurningin um arbeiðsumstøðurnar umborð á okkara skipum og bátum. Hon segði seg serliga hava tey skip í huga, sum royna undir Føroyum, ísfiskaskipini og útróðrarbátarnar og helt ikki, at ein betran av umstøðunum nýtist at merkja, at veiðitrýstið økist.

– Tað er eingin logikkur í at halda, at tað er støddin á toilettunum umborð sum avger, hvussu nógv skipið ella báturin fiskar, vísti hon á.

### Slítast upp fyri tíðina

– Øll møgulig krøv eru um arbeiðsumstøður og trivnað, tá ið ræður um arbeiðspláss á landi – og ikki minst, tá ið nýbyggingar verða gjørdar. So og so høgt skal vera millum loft og gólv, útluftingin skal vera í lagi, og gjóstur má ikki vera. Tilfar, sum er ringt fyri heilsuna, eitt nú asbest og annað, verður skift út ella klætt við øðrum tilfari. Nógv hóvasták verður gjørt fyri at tryggja arbeiðsfólki uppi á landi góðar umstøður og trivnað.

Rúna vísti á, at tá ið ræður um okkara sjófólk og tá serliga teir, sum eru í berandi ísfiskavinnuni undir Føroyum, eru eingi krøv um arbeiðsumstøður og rúmligheit umborð á hesum skipum og bátum.

– Hesir menn eru ringast fyri. Teir slíta seg upp langt fyri tíðina, tí umstøðurnar, teir arbeiða undir, í nógvum førum eru so vánaligar. Løgtingskvinnan segði, at menn, sum ynskja at byggja sær størri og betri skip og bátar, fáa ikki loyvi til tess, uttan so, at teir keypa annað skip og koyra tvey út fyri eitt.

– Men eg haldi ikki, at støddin á skipum og bátum eigur at vera nøkur forðing fyri góðum umstøðum, tí til ber at stýra veiðini í aðrar mátar, helt Rúna.

### Avmarkaður reiðskapur

Løgtingskvinnan reisti eisini spurningin, hví so fáir fiski- og útróðrarmenn tosa um umstøðurnar umborð.

– Ilt er at siga, hví so er, men kanska vilja teir ikki grenja – ella bera teir ótta fyri at verða koyrdir í land, um teir gera ov nógv burtur úr.

Ístaðin fyri at avmarka skip og bátar í stødd, helt hon, at tað hevði verið líðiligari í størri mun at framt avmarkingar í reiðskapinum heldur.

– Ein bátur, sum er so og so stórur, hevur ikki pláss fyri meiri enn einum ávísum tali av snellum. Tað er eisini avmarkað, hvussu nógvir stampar rúmast umborð.

Rúna vísti á, at til ber at avmarka veiðinøgdina við t.d.: 1. tali av fiskidøgum, 2. tali av gørnum, 3. tali av stampum, 4. tali av snellum og 5. stødd á troli og stødd av meskum. Veðurlag og streymviðurskifti er í sjálvum sær eisini ein avmarking hjá teimum smærru skipunum og bátunum

Hon helt, at verða avmarkingar framdar á henda hátt, átti tað at verið nóg mikið.

### Hvar er logikkurin?

– Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, sigur, at loyvi kann ikki gevast til størri skip, tí hesi eru effektivari enn tey smærru. Tá ið eg so skjóti upp at fremja avmarkingar í reiðskapi, sigur landsstýrismaðurin, at so missa skipini møguleikan at effektivisera seg. Tí spyrji eg: Hvar er logikkurin?

Løgtingskvinnan helt ikki, at argumentið um, at størri skip fáa roynt í verri veðri heldur yvir ein kamb.

– Hugsa vit um útróðrarvinnuna og taka ein 40 og ein 50 tonsara sum dømi, so fiska hesir bátar í sama veðri. Munurin er bert tann, at teir, sum eru á tí størra bátinum, hava betri umstøður enn hinir. Hetta veit eg frá royndum útróðrarmonnum, segði Rúna Sivertsen, sum annars heitti á vinnunevnd løgtingsins og myndugleikarnar annars um at taka spurningin um trivnaðin umborð á skipum og bátum í størsta álvara.

# Vestmeningar vænta skip seinni í vikuni

**– Fiskurin heldur sær væl, nú tað er so kalt. Tí er tað eingin trupulleiki, um fiskur liggur niðurfyri í vikuskiftinum, siga tey í Vestmanna**

*Vilmund Jacobsen*

Hóast vestmeningar ikki vænta sær nakra landing fyrr enn í fyrsta lagi hósdagin, verða gólvini ikki turr á virkinum kortini, tí so nógvur fiskur lá niðurfyri frá seinastu viku. Og soleiðis var eisini í vikuni undan hesari.

Tveir trolarar landaðu í Vestmanna í síðstu viku; teir vóru Vesturbúgvin og Grønanes, sum høvdu umleið 150.000 pund av upsa í part. Teir høvdu eisini nakað av toski, sum onnur virki keyptu.

Fram og Vesturbúgvin landaðu ávikavist í Miðvági og á Tvøroyri í síðstu viku og ein partur av upsanum, sum varð landaður í Miðvági, endaði í Vestmanna.

-– So, vit høvdu nógvan fisk í síðstu viku, og nógvur fiskur lá niðurfyri í vikuskiftinum, sum vit arbeiða í hesi vikuni.

### Heldur sær væl

Í Vestmanna siga tey, at nú tað er so kalt í veðrinum, heldur fiskurin sær væl, og tað er eingin trupulleiki at arbeiða fiskin í vikuni eftir.

Teir fyrstu dagarnar í hesi vikuni hevur eingin landing verið í Vestmanna, mená virkinum vænta tey, at okkurt skip kemur inn at landa seinni í vikuni, tó neyvan fyrr enn hósdagin.

Upsin, sum trolararnir fáa, er framvegis smáur.



# Føroya Tele sleppur ikki at framleiða sjónvarp

**Tað er einki, sum forðar Føroya Tele í at senda sjónvarpsrásir, men so leingi Føroya Tele er alment partafelag, sleppur fyritøkan ikki sjálv at framleiða sjónvarp og soleiðis kappast beinleiðis við Sjónvarp Føroya. Tað sigur Óli Holm, mentamálaráðharri, nú Føroya Tele ætlar at fara undir at varpa út sjónvarp**

MIÐLAR
*Rúnar Reistrup*

Sjónvarp Føroya er einasti almenni føroyski sjónvarpsmiðilin, og ta støðuna eiga vit at varðveita og menna. Tað er greiða støðan, ið Óli Holm, mentamálaráðharri, hevur ført fram nógvar ferðir síðan tað kom fram, at Føroya Tele arbeiðir við einari ætlan um at fara undir at senda sjónvarpsrásir út til landsins borgarar.

Í hesari støðu mentamálaráðharrans liggur, at Føroya Tele sum alment partafelag hvørki sleppur at framleiða sjónvarpstilfar ella at gera sína egnu sjónvarpsrás, uttan at politiski myndugleikin blandar seg uppí.

– Eg eri av teirri áskoðan, at Sjónvarp Føroya, og bert Sjónvarp Føroya, eigur at reka sjónvarpsrás í Føroyum. Man skal sjálvandi ikki forða privatum í at gera sína egnu rás, men frá almennari síðu eigur man ikki at stuðla øðrum enn Sjónvarpi Føroya. Um eitt alment partafelag sum Føroya Tele ætlar sær at fara undir egna sjónvarpsrás, eigur tað tískil at verða tikið upp politiskt, sigur Óli Holm, mentamálaráðharri, ið hevur miðlamál um hendi.

### Digitalt sjónvarp

Sambært stjóranum á Føroya Tele, Andras Róin, liggur tó ongin ætlan á borðinum í løtuni, sum kann fáa politiska myndugleikan at ressast.

– Í fyrstu atløgu snúgva okkara ætlanir á sjónvarpsøkinum seg bert um at senda útlendskar sjónvarpsrásir, slær stjórin á Føroya Tele fast, men viðgongur at fyritøkan sjálvsagt hevur ymsar framtíðarmøguleikar í huganum.

– Tað liggja øgiliga nógvir møguleikar í hesum. Digitalt sjónvarp liggur úti í framtíðini og har er tað nokkso upplagt at vit kunnu gera okkum galdandi, til dømis við at kombinera sjónvarp og internet, men alt hetta eru óítøkilig hugskot, sum ikki gerast aktuel í bræði.

### Sjónvarp loysir seg ikki

Síðan hann fór frá sum sjónvarpsstjóri, hevur ein royndur maður innan miðlaframleiðslu, Tróndur Djurhuus, verið leiðari á deildini fyri strategi og virkismenning á Føroya Tele. Spurdur um tað kribblar í fingrunum nú Føroya Tele fær ræðið á einum sjónvarpssendineti, er svarið greitt. Tað ger tað ikki.

– Sum gamal sjónvarpsstjóri veit eg hvussu tungt tað er at reka sjónvarp, og eg veit at her er eingin ætlan upp á tal um at kappast við Sjónvarp Føroya. Møguliga fer Føroya Tele at seta eina rás av til info-kanal, har vit kunnu upplýsa brúkarunum um tænastur og tílíkt, men at gera sendingar verður ikki aktuelt, sigur fyrrverandi sjónvarpsstjórin avgjørdur.

Stjórin á Føroya Tele er samdur í at sjónvarpsframleiðsla ikki er attraktiv fyri fyritøkuna.

– Fyri mær at síggja er Føroya Tele ein fjarskiftisveitari, og okkara uppgáva liggur soleiðis innan veitan og ikki framleiðslu. Hartil kemur at tað neyvan hevði verið nøkur góð forrætning at gjørt sjónvarp. Tað lata vit Sjónvarp Føroya um, sigur Andras Róin, sjónvarpsstjóri.

Tað tykist soleiðis ikki sum at tað fer at elva til stórvegis trupulleikar, at Føroya Tele ikki sleppur at gera sína egnu sjónvarpsrás.

# Polariseringin hevur elvt til mistrivna

**– Polariseringin í føroyskum politikki hevur elvt til ein keðiligan mistrivna millum føroyingar, bæði heima og úti. Tað heldur yngsti tingmaður nakrantíð, Jákup Sverri Kass, sum ikki stillar upp aftur til komandi val**

VAL
*Rúnar Reistrup*

Yngsti maður á tingi nakrantíð, sjálvstýrispolitikarin Jákup Sverri Kass, verður ikki at finna á uppstillingarlista Sjálvstýrisflokksins til komandi løgtingsval.

Jákup Sverri Kass fekk næstflestar atkvøður fyri Sjálvstýrisflokkin í Suðurstreymoyar valdømi, og tá fyrstvalda Helena Dam á Neystabø fór í landsstýrið sum Almanna- og Heilsumálaráðharri, tók Jákup Sverri Kass við sum umboð á tingi. Her sat hann tey fyrstu trý árini av valskeiðnum, til Helena Dam á Nestabø noyddist at taka seg aftur sum landsstýrismaður og tók við tingsessi sínum aftur í fjør.

Orsøkin til at ungi sjálvstýrispolitikarin hevur valt at leggja sína politisku lívsfarleið á ís fyribils, er at hann í fyrstu syftu hevur valt at taka útbúgvinga framum politikkin og er fluttur til Danmarkar, har hann tekur útbúgving á Handilsháskúlanum í Århus.



### Skuffaður av formanninum

At rættiligt rok hevur verið innanhýsis í Sjálvstýrisflokkinum er øllum kunnugt, og síðan formansvalið, hevur fyrrverandi formaðurin í flokkinum og stóri atkvøðuslúkarin, Helena Dam á Neystabø, mestsum rikið fyri vág og vind. Hetta dámar hennara eykamanni lítið.

– Eg eri rættiliga skuffaður persónliga av at formaðurin bar seg soleiðis at, og eg skilji satt at siga ikki avgerð hennara um at taka seg úr flokkinum, sigur Jákup Sverri Kass, sum sigur seg ikki ætla stilla upp fyri annan flokk enn Sjálvstýrisflokkin, um so er at hann vendir aftur til føroyskan politik.

### Kom lítið burturúr

Nú hann lítur aftur á trý ár sum tingmaður og samgongupartur, heldur hann, at sitandi samgonga hevur fingið heldur lítið burturúr.

– Eg upplivdi, at konfrontatiónspolitikkurin, sum varð førdur fyrstu árini, blokeraði fyri nógvum av tí konstruktiva politikki, sum burdi verið førdur. Alt bleiv gjørt upp í loysing og ikki loysing og tað forðaði millum annað effektivt fyri øllum slag av samstarvi við andstøðuna. Vit síggja nú at hesin politikkur ikki hevur ført til nakað stórvegis, og tað er harmiligt, sigur Jákup Sverri Kass.

Hann viðgongur at hann ikki altíð hevur verið heilt samdur við tí politikki, sum tann samgongan, hann var ein partur av, førdi.

– Spurningurin um loysing og samband upptekur meg ikki so nógv. Eg havi hóvlig sjónarmið á hasum økinum. Sjálvandi skulu vit gerast sjálvbjargin, men eg haldi at vit hava gingið alt ov skjótt og harðliga fram. Úrslitið vit síggja nú er at polariseringin sum er farin fram í føroyskum politikki hevur elvt til ein keðiligan mistrivnað millum føroyingar, bæði heima og úti.

### Roynir at halda skansan

Uppstillingarlistin hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymoy er enn ikki almannakunngjørdur, og ein ávísur spenningur valdar um framtíðina hjá flokkinum, nú hvørki fyrst valdi og næst valdi á suðurstreymoyarlistanum á valinum fyri fýra árum síðan stillar uppaftur og tann rokmikla støðan, sum var í flokkinum, uttan iva fer at ávirka valúrslitið.

Jákup Sverri Kass stúrir tó ikki fyri framtíðini hjá flokkinum, tí sum hann sær støðuna nú, er rættiliga sannlíkt at Sjálvstýrisflokkurin fær í minsta lagi eitt umboð inn á ting eftir valið. Men hann viðgongur, at flokkurin má stríðast fyri at halda skansan.

– At vit fara fram í tingmannatali man vera ógvuliga ósannlíkt, sigur Jákup Sverri Kass.

# Ein er ov lítið

**Sjálvstýrisflokkurin er í einari torførari støðu nú tað stundar til val. Maðurin í Suðurstreymoy er i vanda, og ein ávísur ivi er eisini um mannin í Eysturoynni. Sambært floksformanninum er ein maður ov lítið fyri flokkin**

VAL
*Rúnar Reistrup*

Nú hvørki stóri atkvøðuslúkarin hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymoy við seinasta val, Helena Dam á Neystabø, ella næstvaldi í valdøminum, Jákup Sverri Kass, stilla upp aftur til komandi løgtingsval, er eitt vakum á uppstillingarlistanum í Suðurstreymoy.

Ronald Poulsen, ið var nummar trý á listanum hjá Sjálstýrisflokkinum í Suðurstreymoy við seinasta val, ásannar, at tað verður torført at savna eins nógvar atkvøður í Suðurstreymoy við komandi val.

– Men vit hava nøkur nýggj fólk á listanum, sum vónandi kunnu vera við til at lyfta byrðuna, sigur Ronald Poulsen, ið ikki kennir seg vísan í at tað fer at eydnast at fáa ein mann inn í Suðurstreymoy. Talan er um fólk, ið ikki hava gjørt vart við seg í politikki fyrr, men onkur er kendur frá ítrótti og frá vinnulívinum er tað tættasta vit koma uppá eina avdúking frá Ronald Poulsen.

Hann setir sína vón til at flokkurin fer at klára seg væl í Norðoyggjum og í Eysturoynni.

– Gongur tað væl fáa vit kanska tríggjar valdar, men gongur tað illa vera vit helst ov stuttir bæði í Norðoyggjum og í Suðurstreymoy, og so fáa vit kanska bara ein, sigur Ronald Poulsen, ið ikki vil meta um møguleikan fyri at flokkurin als ikki verður umboðaður á tingi eftir komandi val.

Formaður Sjálvstýrisfloksins, Eyðun Eltør, verður ikki nøgdur, um flokkurin bert fær ein mann á ting.

– Vit fara á val við tí fyri eyga at varðveita støðuna við tveimum tingmonnum. Ein er ov lítið, sigur Eyðun Eltør.

Uppstillingarlistin hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymoy verður klárur seinni í vikuni, og tá fæst at vita hvør skal royna at endurvinna tær atkvøðurnar, sum Helena Dam á Neystabø fekk við seinasta val. Men alt avhongur av teimum, ið velja.

– Nú mugu sjálvstýrisfólk reisa seg og fara á val fyri at tryggja hesum søguliga flokki eina framtíð, sigur Ronald Poulsen áheitandi.